

**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SD 828 **Km:** 69.000
**Árgangur:** 25.11.2003
**Útgjald:** 31.000 **Mðr. gjald:** 2.410 (5 ár)

**kr. 124.000,-**



**TOYOTA YARIS LUNA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KE 941 **Km:** 16.418
**Árgangur:** 11.05.2006
**Útgjald:** 38.000 **Mðr. gjald:** 2.469 (5 ár)

**kr. 152.000,-**



**FORD FOCUS GHIA 1.6** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VP 011 **Km:** 35.000
**Árgangur:** 30.12.2004
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 2.425 (5 ár)

**kr. 148.000,-**



**BMW 320 D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SB 326 **Km:** 146.000
**Árgangur:** 01.06.2001
**Útgjald:** 38.750 **Mðr. gjald:** 3.858 (3 ár)

**kr. 155.000,-**



**MAZDA 6 2.0 BENSIN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GF 564 **Km:** 97.000
**Árgangur:** 03.09.2004
**Útgjald:** 38.000 **Mðr. gjald:** 2.489 (5 ár)

**kr. 152.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 VVT-I 4X4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 58.750 **Mðr. gjald:** 3.744 (5 ár)

**kr. 235.000,-**



**TOYOTA CAMRY 2.4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VH 257 **Km:** 104.500
**Árgangur:** 23.09.2002
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 3.709 (3 ár)

**kr. 148.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 H/B AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JH 264 **Km:** 117.878
**Árgangur:** 10.06.2002
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 2.701 (3 ár)

**kr. 108.000,-**



**COROLLA 2.0 LINEA TERRA D-4D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HE 038 **Km:** 217.000
**Árgangur:** 07.08.2002
**Útgjald:** 21.250 **Mðr. gjald:** 2.151 (3 ár)

**kr. 85.000,-**



**SUBARU LEGACY 2.0 AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AD 873 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.172 (5 ár)

**kr. 198.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F



*Sámal Bláhamar hevur verið høvundanum góður stuðul í arbeiðinum at skriva bókina, og Mathias Lassen handaði Sámali Bláhamar eitt eintak av bókini um Westerbeek*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Bókin um Westerbeek alment løgd fram

**Hóskvøldið legði Mathias Lassen alment fram bókina um hollendska skipið, Westerbeek, sum rendi á land á Lopranseiði fyri 266 árum síðani**

BÓKAÚTGÁVA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hollendski eysturindiafarin Westerbeek fór á land undir Kirvinum sunnan fyri Lopranseiði í Suðuroynni tann 2. september í 1742.

Síðani hevur hetta verið eitt av gitnastu skipsbrotum í søgu Føroya, og søgur hava livað á mannamunni.

Men nú er kannað og skrivað, og bók er nú tøk við øllum, ið vert er at vita um hendingina, og tað, sum hevur við hendingina at gera.

## Framløga

Hóskvøldið var almenn framløga av bókini um Westerbeek í Stóra Pakkhúsi í Vági. Nógv fólk hevði leitað sær í húsið at hoyra Mathias Lassen greiða frá kanningararbeiðinum. Mathias Lassen hevur verið nærlagdur, og hann hevur latið stórverk úr hondum, ið ikki tykist lata nógvar óskrivaðar reglur eftir í spennandi søguni um Westerbeek.

Eisini var áhugin eyðsýnt stórur at ogna sær bókina longu á framløgudegnum.

## Eftirkomarar

Nógv hevur verið prátað um, at eftirkomarar eru í Føroyum eftir manningina av Westerbeek, og so er.

Ein teirra er Sámal Bláhamar, ið eisini hevði leitað sær til Vágs til bókaframløguna. Sámal greiddi frá ættini, og at hann sjálvur er sjeynda lið í grein av eftirkomarum av Westerbeek. Sámal Bláhamar hevur verið høvundanum góður stuðul í arbeiðinum at skriva bókina, og Mathias Lassen handaði Sámali Bláhamar eitt eintak av bókini um Westerbeek.

# Russar úr Kollafirði

**Seinnapartin í dag fóru 18 av manninginí á russiska skipinum ROS til Keypmannahavnar við Atlantsflogi. Tó er skiparin, saman við tveimum øðrum, enn í Kollafirði**




FISKIVINNA
*Jóanis Nielsen*
*joanis@post.olivant.fo*

Fleiri av teimum 18 monnunum hava verið í Føroyum síðani 14. mai, tá ið russisku skipini Izotop og Ros vórðu tikin, fyri at hava fiskað ólógliga í føroyskum sjógvi.

Í Føroya Rætti fingu skipararnir 100.000 krónur í bót hvør. Harafturat skuldu teir gjalda fyri virðið á fiskinum, sum mett varð, at teir høvdu fiskað í føroyskum sjógvi. Virðið varð mett til 132.530 krónur hjá Izotop og 242.860 krónur hjá Ros. Dómurin er kærdur til Landsrættin.

Izotop fór til fiskiskap aftur, tá trygd varð veitt fyri upphæddini, men Ros liggur enn á Kollafirði, har hann hevur ligið í meira enn hálvt ár.

Tað vóru 36 mans við Ros, tá teir vóru tiknir 14. mai. Nakrir eru farnir heim við russiskum skipum, onkur við Norrønu og 18 fóru loftvegis í kvøld, men enn er skiparin saman við tveimum av manningini umborð á Ros.